# VEÐRIÐ Í HATTARVÍK



# SEPTEMBER 2024

# VEÐURSTOVA FØROYA

**Dagfesting**: 6. september 2024

**Staður**: Faktorsvegur 14 – 700 Klaksvík

**Heimildarfólk:** Leivur Fuglø

**Viðtal við**: Hanus Kjølbro

## Hattarvík og veðrið í bygdini

Hattarvík er tann eystara bygdin á Fugloynni, liggur í einum brøttum dali við eina lítla vík, sum vendir í landsynning sunnan.

Niðan úr bygdini norðureftir er Skarði (156m), og norðan fyri tað er opið norður í hav. Kemur hann høgt ella lágt fer hann javnur oman- og niðan ígjøgnum bygdina. Tað sum kemur upp av sjónum, ger vanligan ongan skaða, siga hattarvíksingar.

Eystanfyri er Eystfellið (449m), sum forðar fría vindinum, tá ið ættin er úr landnyrðingi niður í landsynning. Hetta ger serliga landnyrðingin ójavnan og er tann keðiligasta ættin í bygdini. Eisini er hann er rangur í vestara býlinginum – Niðri í Húsi. Hetta ávirkar eisini viðurskiftini til mjørka og brim.

Úr bygdini og vestureftir eru eisini fjøll, sum steðga lotinum úr útsynningi upp í útnyrðing. Hesi fjøllini eru umleið 200 metrar hægri enn Eystfelli. Er lítið av vindi, er uppaftur minni vindur í Hattarvík á hesum ættum, men er nógvur vindur, gerst hann ójavnur við nógvum vindi, og hann er rangur í eystara býlinginum – Uppi í Húsi. Er ættin útnyrðingur, verður lotið í Norðbergi tvungið næstan 600 metrar upp, og tí regnar sera ofta á ættini. Fjøllini ávirka eisini viðurskiftini við mjørka og brimi – líkasum Eystfelli, tá ið hann liggur eystaneftir.




Mynd 1: Kort av Fugloy. Pílarnir peika ímóti Hattarvík.

Fyri at fáa vita, hvussu veðrið er á teimum ymsu ættunum í Hattarvík, setti undirritaði seg í samband við Leiv Fuglø, sum er ættaður úr Hattarvík og hevur búð har meginpartin av lívinum.

Við til samrøðuna, sum var í hølunum hjá Veðurstovur Føroyar á vestaru bryggju í Klaksvík, hevði eg spurnarblað – til allar 16 ættirnar, ið vanliga eru umtalaðar í bygdini:

- Er vindurin javnur ella ójavnur á ættini
- Er meira vindur í ættini enn aðrasteðs – ella øvugt
- Er ættin vát – t.e. regn, tá ið turt er aðrastaðni – ella øvugt
- Er hetta mjørkaætt?
- Er ættin vanliga ein góð ætt ella ein ring ætt – ber til at siga tað við fáum orðum?
- Onnur viðurskifti um ættina, søgur, fyribrigdi, hendingar o.s.fr.

Spurt varð somu spurningarnar ætt fyri ætt. Byrjað varð við norðan, og var farið allan kringin runt eystureftir, og steðgað var við heil- og hálv- og millumættirnar.

Spurningar og svar og aðrar viðmerkingar síggjast aftast í hesum skjali.




*Mynd 2: Tær 32 ættirnar. Til samrøðuna eru ikki allar 32 ættirnar brúktar, men onnurhvør - t.e. heil-, hálv- og millumættirnar.*

## Norðan

Norðan kemur upp fyri Raðhamar og oman brekkuna til bygdina.




Norðan er ein góð ætt við jøvnum vindi millum hús, men hann melur runt á víkini, og hvirlur eru nakað niðanfrá. Vindferðin er sum fyri landið.

Norðan roynist væl til avfall. Ikki nógv regn ella nógvur kavi á ættini. Kemur sólin fram á norði, so er ælið víst.

Norðan er ikki vanlig mjørkaætt, men í lítlum vindi á sumri kann vera mjørki.

Vanliga er norðan ikki roknað sum brimætt í Hattarvík, men er ringt veður, kann tað brima. Í nógvum vindi høgt er atkoman hjá postbátinum góð. Tað kann vera óslætt at sigla út til Fugloyar, og báturin má fyrst fara á Svínoyarvík. Túrurin út kann tí gerast bæði ringur og drúgvur.

## Landnyrðingur norðan

Tá ið ættin er landnyrðingur norðan líkist veðrið veðrinum, tá ið hann er norðan.

## Landnyrðingur

Landnyrðingur liggur beint inn í Eystfelli og er ringasta ætt í Hattarvík til vind.




Vindurin er nokkso javnur í bygdini, og vindferðin er nakað væl meir enn kring landið. Í hampuligum veðri er javnt og keðiligt veður í Hattarvík. Er nakað av vindi, liggur hann rangur niðurav uppi á Krossi og við Pallarnar, sum eru uttan fyri kajuna. Landnyrðingur er ringasta illveðursættin, men hon er ikki skaðaætt.

Í Eystfelli er landnyrðingur sera góður. Sagt verður, at tað doyr ikki lamb á landnyrðingi har. Í Bergstriðingi er tað ein ring ætt.

Landnyrðingur er ikki ein vát ætt, tað regnar ikki nógv á ættini, men um veturin kann nógvur kavi leggjast.

Tað kann vera mjørki á landnyrðingi, men ikki ofta. Sjóvarfallið ávirkar nógv mjørkan. Um summarið er sjógvurin eystanfyri næstan eitt stig kaldari enn sjógvurin vestanfyri, og tá ið eystfall er, og kaldari sjógvur rekur norður ígjøgnum Fugloyarfjørð og norður við oynni eystanfyri, er meira mjørki, enn tá ið vestfallið er.

Landnyrðingur er ring brimætt. Tað kemur so merkiliga ilt í sjógvin, og á víkini er krappsjógvað. Eystan fyri oynna er landnyrðingur eisini ringasta ættin.

## Landnyrðingur eystan

Landnyrðingur eystan líkist landnyrðingi. Hann kastar omanav.

## Eystan

Eystan kemur beint inn í bergið eystanfyri og kemur inn oman fyri húsini. Hann liggur eisini undan Múlanum og skáar har.




Vindurin er ójavnur, tá ið hann er eystan, og tað er meira vindur enn kring landið. Hann kemur upp um Eystfelli og slær niður ígjøgnum líðina og liggur rangur vestarumegin – t.e. Niðri í Húsi. Er nógvur vindur kunnu vera skaðahvirlur.

Tá ið hann er vestan, er tað júst øvugt. Tá liggur hann rangur úr Eystfelli og slær niður Upp í Húsi. Hann er eitt sindur ójavnari og slær harðari niður á vesturættini enn á eysturættini, tí at økið vestan fyri bygdina er munandi størri og hægri enn eystanfyri.

Eystan er ring mjørkaætt í Hattarvík.

Eystan roynist illa til brim í Hattarvík. Aldan kennist keðilig, og hon kemur beint inn á kajuna. Tað kyrrar skjótari aftur um summarið enn um veturin, og serliga eysturættin kyrrar væl skjótari enn vesturættin, tí tað er eingin súður.

## Landsynningur eystan

Landsynningur eystan líkist landsynningi. Hann brimar meir enn á eystri.

## Landsynningur

Landsynningur er ein keðilig ætt. Hann skáar undan Múlanum og kemur inn á víkina.




Vindurin er javnur, tá ið hann er landsynningur. Eisini tá ið tað er nógvur vindur. Vindferðin er sum fyri landið. Landsynningur er ikki skaðaætt, tí tað sum kemur upp av sjónum, tað ger ongan skaða.

Landsynningur er ein vát ætt – ring terraætt. Tó kann vera terri, um terri er í veðrinum.

Landsynningur er ring mjørkaætt og brimætt í Hattarvík.

## Landsynningur sunnan

Víkin er opin í landsynning sunnan, so lotið kemur beint inn á víkina. Vindurin er tí javnur, og vindferðin er sum fyri landið.

## Sunnan

Sunnan kemur fram við Svínoynni og inn á víkina. Hann skáar við lendingina.




Tá ið hann er sunnan er vindurin javnur, og vindferðin er sum fyri landið. Bæði tá ið tað er litil vindur ella nógvur vindur.

Suðurættin er góð summarætt í Hattarvík, men er ikki góð um veturin. Hann kemur undan Svínoynni til Hattarvíkar. Kirkja er nógv betur vard av Svínoynni. Tá liggur hann javnur av Svínoyardalinum og yvir um fjørðin.

Suðurættin var roknað sum besta ættin í Stapa, har nógv lomviga varð fleygað fyrr.

Sunnan er bæði mjørka- og brimætt i Hattarvík.

## Útsynningur sunnan

Útsynningur sunnan líkist útsynningi – tað er ein góð ætt um summarið, men ikki um veturin.

## Útsynningur

Útsynningur kemur um Bergið og fer tvørtur um víkina.




Tá ið ættin er útsynningur, er vindurin eitt sindur ójavnur – hetta er góð summarætt, men roynist ikki væl um veturin. Niðri í Húsi skáar eitt sindur, tá ið vindurin er lítil. Uppi í Húsi er vindurin eitt sindur javnari.

Útsynningur er saman við vesturættini góð terraætt. Vanliga ikki nógv regn, tó at tað kann regna ella vera ælaveður viðhvørt.

Tað kann vera mjørki á útsynningi á sumri. Hann kemur fram við landi og kann fylla víkina og bygdina við. Inni í Vík – t.e. Skarðsvík – eru ættirnar úr útsynningi upp í útnyrðing góðar. Har er ikki mjørki á útsynningi. Tað kann vera tjúkt í mjørka heimanfyri – t.e. í bygdini – meðan tað er klárt og gott fjallveður inni í Vík. Tað blívur klárt, tá ið komið verður inn um Kleivina.

Útsynningur er brimætt um veturin – men ikki um summarið. Brimið sæst ikki, tá ið tað kemur sníkjandi fram við landi, og tað er ójavnt. Innast í víkini er grunt, og har er tað mesta brimið. Ættin liggur eitt sindur tvørtur um víka, so tað skáar við kajuna – meiri enn á suðurættini. Kemur dráttur inn í víkina av útsynningi ella útsynningi vestri um heysti, so er hann verandi fyri veturin. Hetta kalla tey vestanbrim ella útsynningsbrim. Tað súðar vanliga leingi av útsynningi, og tað skulu fleiri dagar til at fáa útsynningsbrimið vekk. Onkuntíð hevur tað verið allan veturin.

Tað kyrrar skjótari aftur um sumrarnar enn um vetrarnar, tí tað er nógv meiri megi í veðrinum um veturin.

## Útsynningur vestan

Á útsynningi vestri skáar á víkini – líkist vesturættini.

## Vestan

Vestan kemur beint inn á Norðberg og fer upp um alla oynna eystureftir ímóti Hattarvík.




Tá ið hann er vestan, er vindurin ójavnur. Ættin er góð í vanligum veðri við lítlum vindi, og vindferðin er minni enn kring landið. Er veðrið keðiligt við nógvum vindi, er vindurin ójavnur við hvirlum. Uppi í Húsi er hann rangur – hann slær niður av Eystfelli og kemur niður úr líðini. Júst tað øvugta av eysturættini. Tá kann hann glaða báðar vegir á víkini.

Vestan er saman við útsynningi góð terraætt. Vanliga ikki nógv regn, tó at tað kann regna ella vera ælaveður viðhvørt.

Vestan er hvørki mjørka- ella brimætt í Hattarvík. Kyrruætt.

## Útnyrðingur vestan

Útnyrðingur vestan sleppur ikki javnur omanav. Tað regnar ikki so illa sum á útnyðringi, og ættin líkist tí meira vestan.

## Útnyrðingur

Útnyrðingur er ein keðilig ætt – vátasta av høgættunum – altíð vindur niðurav og út av víkini.




Tá ið ættin er útnyrðingur, liggur hann omanav. Í bygdini er vindurin javnur, men uppi í haganum er hann ójavnur. Vindferðin er sum fyri landið.

Útnyrðingur hevur nógv avfall við sær. Tað regnar nógv.

Útnyrðingur er ikki mjørkaætt í Hattarvík, men á sumri kann vera tjúkt í erva.

Útnyrðingur er ikki brimætt.

## Útnyrðingur norðan

Útnyrðingur norðan er betri enn útnyrðingur og líkist meiri norðurættini.